# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samvinna við Stórabretland

Í farna mánað vitjaði landsstýrismaðurin í vinnumálum, Johan Dahl bretska høvuðstaðin fyri at fáa innlit í arbeiði hjá føroysku sendistovuni har og fyri at hitta umboð fyri bretskar oljumyndugleikar og bretskar parlamentslimir við atliti til at menna samvinnuna millum londini.

Sum skilst vóru fundirnir góðir. Føroyski sendimaðurin Áki Johansen gav eina gjølliga kunning um virksemið á sendistovuni. Eftir tað vitjaði landsstýrismaðurin bretsku oljufyrisitingina, har hann varð kunnaður um framíðar ætlanir og møguleikar í sambandi við olju- og gassleiting og framleiðslu vestan fyri Hetland. Landsstýrismaðurin hitti eisini høgtstandandi umboð fyri StatoilHydro, sum vóru rættiliga bjartskygd um komandi oljuleitivirksemið við Føroyar. Loksins vitjaði Johan Dahl eisini í bretska parlamentinum, har hann hitti umboð fyri bretsk-føroyska bólkin í tinginum. Tosað varð um møguleikarnar fyri at menna samvinnuna millum londini. Í hesum bólkinum, sum nettupp hevur til endamál at knýtta tættari bond millum báðar tjóðirnar, eru tinglimir úr ymsum pørtum av Bretlandi umboðandi ymsar flokkar og áhugamál. Formaðurin er úr Orknoyggjunum.

Eingin ivi er um í okkara hugaheimi, at Bretland er nettupp eitt av okkara framtíðar fokusøkjum. Vit hava søguliga tradition fyri samvinnu við Bretland her ikki minst á fiskivinnuøkinum. Hetta samband eigur avgjørt at útbyggjast eins og vit nú eisini eiga at foksusera meira uppá eitt framtíðar oljuvinnusamstarv. Men eisini í aðrar mátar er gróðrarbotnur fyri samvinnu, handilsliga og mentanarliga.

Alt gott um okkara norðurlendsku røtur og samvinnutraditiónir. Tær hava verið við til at menna okkum sum land og fólk, men tíðin er komin til, at vit í størri mun eisini hyggja aðrar vegir, og her er Stórabretland ein stórur og spennandi marknaður, umframt at landið er ein góð lopfjøl at røkka longur inn á europeiska meginlandið.

Tí er tað eisini kærkomið og skilagott, tá landsstýrismaðurin í vinnumálum tekur stig til eina slíka kunningarferð. Eftir okkara tykki hevur sendistova okkara í London ein týðandi lut í hesi gongd, og vónandi fáa vit ein veksulvirkning millum sendistovuna, føroyskar myndugleikar og ikki minst vinnu- og handilsrekandi heima sum burturi.

Vit hava lyndi til bara at fokusera uppá okkara útflutning, men tað hevur so sanniliga eisini nógv at siga fyri okkara samfelag, at vit eisini hugsa um innflutningin. At vit troyta teir bestu og bíligari marknaðirnar og sleppa undan dýrkandi millumliðum í teimum londum vit traditionelt handla við og brúka sum millumstøðir. Tað var tí eisini stórt spell, at Norrøna gavst at sigla til Stórabretland, men vit mugu so bara hava við í framtíðar tilrættaleggingini at leggja botn undir einum komandi sambandi, ið kann vera við til at byggja brýr bæði fyri okkara útflutning og innflutning. Sosialurin og Rás2 vóru í London samtíðis sum landsstýrismaðurin vitjaði. Vit fara tí eisini í Rásini og í blaðnum at hava tilfar haðani.

**Sosialurin**

## Kynstrið at flyta eitt komma



**EDMUND JOENSEN**
Løgtings- og fólkatingsmaður

**Íslendska avgerðin um at søkja ES-limaskap og gongdin í heiminum í dag krevja, at Føroyar broyta sín Europapolitikk. Veruleikin hevur yvirhálað føroyska uttanríkisráðið, ið framvegis ikki vil flyta eitt komma í Europapolitikkinum**

Ísland hevur tikið eitt stórt uttanríkispolitiskt stig við at lata Europasamveldinum sína umsókn um limaskap.

Í roynd og veru eru íslendingar komnir nógv longri enn vit í Føroyum. Hetta hóast samgonguskjalið hjá ABC-samgonguni sigur, at vit skulu í samráðingar við ES til tess at vita, hvørjar treytir eru fyri at gerast partur av felagsskapinum.

Íslendska stjórnin torir at fáa vitan. Føroyska landsstýrið torir av einhvørjari orsøk ikki.

### Føroyska perspektivið

Bert fá hava sett søguligu avgerðina hjá Altinginum í farnu viku inn í ein føroyskan samanhang. Kortini munnu tey flestu vita, at íslendska avgerðin er sera viðkomandi fyri okkum í Føroyum.

Avgerðin fær serliga ávirkan á vinnuliga kappingarføri okkara. Sannlíkt er, at Føroyar koma í ta støðu, at føroyska fiskivinnan ikki longur er kappingarfør mótvegis íslendsku fiskivinnuni.

Hetta hevði verið ein vanlukka fyri okkum, tí vit fara tá at bløða fíggjarliga. Inntøkurnar fara at svíkja, og tað fær avleiðingar fyri vælferðina og alt annað, sum skal fíggjast í okkara landi.

### Aðrar avleiðingar

Íslendski ES-limaskapurin man koma skjótt. Uttanríkisráðharri Íslands er í arbeiðsklæðum, og hann metir, at landið er innan fyri europeiska garðin longu í 2012 ella har á leið.

Her er ein røð av øðrum avleiðingum, tá Ísland er komið upp í ES:

- Hoyvíkssáttmálin fellur helst burtur og harvið lagaligir handilsmøguleikar við Ísland
- Veiki EFTA-felagsskapurin viknar uppaftur meira, tí bert Noreg, Liechtenstein og Schweiz standa eftir
- Besti "vinurin" hjá Føroyum í EFTA hvørvur
- Fyri Føroyar gerst EFTA fullkomiliga óáhugavert, tí størsti kappingarneytin er farin upp í ES og fær fría atgongd til marknaðin umframt aðrar fyrimunir
- Tankin um eina fiskivinnusamgongu millum Ísland, Noreg og Føroyar, ið Tjóðveldi og Javnaðarflokkurin tala fyri, gerst óhugsandi
- Áhugin at gera íløgur í Íslandi økist, tí landið er við í ES og hevur at kalla óavmarkaðar ikki-dálkandi orkumøguleikar
- Ísland gerst áhugavert og mennandi land fyri ung at búgva í
- Við at lata upp fyri Europa fær Ísland møguleika at gerast fíggjarliga stabilt

Í Noreg eru fólk farin at umhugsa somu leið sum íslendingar, og ein møguligur norskur ES-limaskapur fer sjálvsagt eisini at ávirkað okkum í Føroyum nógv. Noreg er jú stórt fiskivinnuland og ein av heimsins størstu laksaalitjóðum.

### Ein spurningur um dirvi

Avgerðin hjá Altinginum um at fara í samráðingar um limaskap í ES vísir fyrst og fremst, at íslendingar hava dirvi at finna útav, um ES-limaskapur er nakað fyri teir. Serliga viðkomandi er at fáa vitan um, hvørjar treytirnar verða fyri fiskivinnuni. "Vit skulu jú vita og ikki gita", er sagt.

Fiskivinnan er júst áhugaøkið hjá Føroyum, og útlitini mugu sigast at vera góð. ES hevur jú ein nýggjan fiskivinnupolitikk, har limalond sjálvi stýra vinnuni og fiskiskapinum. Høvuðskravið úr Brússel er, at fiskiskapurin og fiskivinnan eru burðardygg.

Í Føroyum er lítið dirvi í ES-málinum. Vit tora ikki at seta okkum saman við ES at fáa greiði á treytunum fyri at gerast partur av samveldinum. Heldur enn at vita vil sitandi landsstýri rekast fyri vág og vind við bindi fyri eyguni og proppum í oyrunum. Hetta er ábyrgdarleyst.

### Kommaið skal flytast

Høvuðsorsøkin til, at onki hendir í føroyskum ES-politikki, skal finnast í føroyska uttanríkisráðnum. Har sigur landsstýrismaðurin púra misskilt, at gongdin í Íslandi ikki flytur eitt komma í føroyska Europapolitikkinum.

EFTA-felagsskapurin, sum uttanríkisráðið vil hava Føroyar upp í, viknar í stórum. Einasti "vinurin" hjá Føroyum í EFTA er á veg úr felagsskapinum, og sannlíkt er, at grundarlagið undir EBS-skipanini er farið at ridlað. Eisini av hesi orsøk eigur føroyskur Europapolitikkur at rætta kós.

Løgmaður eigur tí sum skjótast at taka stig til, at Europapolitikkurin hjá ABC-samgonguni verður dagførdur sambært tí veruleika, vit í dag eru í. Føroyar hava tørv á at flyta seg eftir altjóða rákinum.

Nú er tíðin komin til, at uttanríkisráðið flytir kommaið í sínum Europapolitikki. Verður tað ikki gjørt, kundi væl hent seg, at onnur flyta kommaið í staðin.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.